# Løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframagrunn

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1. Til at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur verður Vinnuframagrunnur settur á stovn. Grunnurin skal virka samsvarandi vinnupolitikki landsins og annars innan tær avmarkingarnar, ið settar verða í hesari lóg, og tær avmarkingar, ið altjóða samvinnulag til eina og hvørja tíð natúrliga setir.

§ 2. Vinnuframagrunnurin verður skipaður sum eksternur grunnur. Stovnsfæ grunsins verður útvegað við avtøku av fimm øðrum vinnuframagrunnum hjá landinum. Harumframt kann grunnurin fáa ein árligan stuðul á Løgtingsins fíggjarlóg.

*Stk. 2.* Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum.

*Stk. 3*. Fíggjarætlan grunsins verður tikin við á Løgtingsins fíggjarlóg.

§ 3. Grunnurin verður fyrisitin av einum av landsstýrismanninum í vinnumálum tilnevndum stýri við 5 limum. Stýrið verður valt fyri 4 ár. Landsstýrismaðurin velur formannin. Nevndarlimir og tiltakslimir kunnu tilnevnast upp til tvær ferðir.

*Stk. 2*. Grunnurin skal fylgja teimum lógum, reglum, sáttmálum almennum fyriskipanum, ið eu galdandi fyri fyrisiting landsins.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í kunngerð um umsiting og virksemi grunsins.

§ 4. Landsstýrismaðurin staðfestir í stuðulsskipanum hvørji endamál, ið Vinnuframagrunnurin kann stuðla, og undir hvørjum treytum, herímillum hvørji vinnugreinaøki kunnu verða stuðlað.

*Stk. 2.* Stuðul kann eftir umsókn verða veittur fyritøkum til tiltøk, sum við framtíðini í huga betra um kappingarevnini ella økja um altjóðageringina hjá fyritøkunum.

*Stk. 3.* Grunnurin kann herumframt veita stuðul til serstøk vinnuframaátøk og heildarverkætlanir innan útflutning, nýskapan, førleikamenning, ferðavinnu og gransking.

*Stk. 4.* Við løgtingslóg kann verða gjørt av, at partur av stovnsfænum kann verða nýttur til stovnseting ella týðandi menning av vinnuligum undirstøðukervi.

§ 5. Tilsagnir um játtan verða útreiðsluførdar í tí roknskaparári, tær eru givnar.

*Stk. 2.* Stýrið kann áseta nærri reglur fyri mannagongdum viðv. tilsagnum, og verða hesar at góðkenna av landsstýrismanninum.

§ 6. Roknskaparhaldið skal fylgja lógini um landsins almenna roknskaparhald v.m. Roknskapirnir verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara.

*Stk. 2.* Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing um virksemið í farna árinum.

*Stk. 3.* Í serstakari frágreiðing ger Vinnuframagrunnurin serligt tilmæli um væntaðan tørv á játtanum av Løgtingsins fíggjarlóg.

§ 7. Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál, sum varð settur á stovn sum eksternur grunnur við § 3, stk. 1, nr. 7, í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, verður tikin av, og fíggjarstøða grunsins verður flutt Vinnuframagrunninum.

*Stk. 2.* Gistingarhúsgrunnurin (Grunnur Ferðavinnunar), sum somuleiðis varð settur á stovn sum eksternur grunnur við § 3, stk. 1, nr. 3, í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, verður eisini tikin av, og fíggjarstøða grunsins verður flutt Vinnuframagrunninum.

*Stk. 3.* Tilsagnir um játtan, givnar av Grunninum til ídnaðarfremjandi endamál og Gistingarhúsgrunninum, verða yvirtiknar av Vinnumframagrunninum.
*Stk. 4.* Landskassin yvirtekur lán, sum eru veitt úr Grunninum til ídnaðarfremjandi endamál og Gistingarhúsgrunninum.
*Stk. 5.* Føroya Ídnaðargrunnur, sum varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 13. september 1970 við seinni broytingum, verður tikin av, og verða ognir, skyldur og eventualskyldur hjá grunninum fluttar Vinnuframagrunninum.
*Stk. 6 .* Menningargrunnur Ídnaðarins, sum varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 51 frá 20. mai 1996, verður tikin av, og verða ognir, skyldur og eventualskyldur hjá grunninum fluttar Vinnuframagrunninum.
Stk 7. Landskassin yvirtekur lán, sum eru veitt út Menningargrunni Ídnaðarins.
*Stk. 8.* Ábyrgdargrunnurin, sum varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 69 frá 10. mai 1994 við seinni broytingum, verður tikin av, og verða ognir, skyldur og eventualskyldur hjá grunninum fluttar Vinnuframagrunninum.

§ 8. Vinnuframagrunnurin kann verða tikin av við løgtinslóg, og ognir grunsins verða tá fluttar í landskassan.

§ 9.Henda lóg kemur í gildi 1. januar 2001. Samstundis fara úr gildi § 3, stk. 1, nr. 3 og 7, í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, løgtingslóg nr. 68 frá 13. september 1970 um Føroya Ídnaðargrunn, við seinni broytingum, løgtinslóg nr. 51 frá 20. mai 1996 um Menningargrunn Ídnaðarins og løgtingslóg nr. 69 frá 10. mai 1994 við seinni broytingum um Ábyrgdargrunnin, tó soleiðis, at umsóknir, ið eru komnar inn í tíðarskeiðnum 1. januar 2001 og til henda lóg er lýst, verða at viðgera eftir higartil galdandi reglum.

Tórshavn, 8. mai 2001

**Anfinn Kallsberg (sign.)**

løgmaður